# Ætlar at stilla upp-aftur

**Borgarstjórin í Vági heldur at enn hevur hann nakað at geva í politikki**

KOMMUNUVAL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



**Vágur:** Jògvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, ætlar at stilla upp aftur á kommunvalinum.

Hann hevur játtað at vera á listanum hjá tjóðveldisflokkinum í Vági, men uppstillingin er ikki liðug enn.

Jógvan Krosslá er 62 ára gamal og nú eru tað 12 ár síðani, at hann kom uppí kommunupolitikk.

Hann varð fyrstu ferð valdu á valinum í 1992 og hann kom beint í eldin, tí hann gjørdust borgarstjóri beinanvegin og tað hevur hann verið síðani.

Sigast kann ikki annað enn at hann hevur verið ein av teimum kendastu borgarstjórunum í landinum.

Hann hevur stýrt Vágs kommunu ígjøgnum ringastu kreppu í søguni og sum formaður í kommunusamskipan Føroya, hevur hann eisini gjørt vart við seg. Og nú Vágur aftur hevur er í fríum falli, ætlar hann ikki at blaka frá sær.

Hann heldur, at verður hann valdur, hevur hann framvegis nakað at geva í politikki.

# Hergeir Nielsen: Hetta er gróðursettur ørskapur

**– Endamálið er onki annað enn at seta suðuroyingar upp ímóti hvørjum øðrum fyri at forkoma miðnámsskúlanum í Vági, sigur Hergeir Nielsen**

ÚTJAÐARI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað er ófyrigevilig synd at løgmaður, Johan Dahl og Hendrik Old, soleiðis tveita ein brand beint inn í eitt friðaligt mál, sum ein loysn er funnin á, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður*

**Suðuroy:** – Hetta er gróðursettur ørskapur

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, er ógvuliga hvassorðaður ímóti ætlanini hjá landsstýrinum at flyta ætlaða miðnámsskúlan úr Vági og leggja hann í ein skúladepil í Hovi og at byggja eitt røktarheim í Vági ístaðin.

Hergeir Nielsen er løgtingsmaður fyri Suðuroynna og vit hava spurt hann, hvat hann heldur um hesa ætlan.

– Hetta er fullkomiliga vitleyst og eg eri púra sannførdur um, at einasta endamálið við hesum er at forkoma miðnámsskúlanum í Vági.

Hergeir Nielsen heldur, at við hesum hevur landsstýrið tveitt ein brand inn í eitt mál sum varð loyst og sum friður valdaði um.

– Og tað er rætt og slætt ein ófyrigevilig synd av løgmanni og teimum báðum løgtingsmonnunum úr Suðuroy í samgonguni, Johan Dahl og Hendriki Old, soleiðis at seta suðuroyingar upp ímóti hvørjum øðrum í einum máli, sum semja var um.

## Vildu ongantíð hava skúlan í Vági

Hergeir Nielsen, sum eisini býr í Vági, sigur, at tað kravdi stríð í fleiri ár at fáa undirtøku fyri at byggja miðnámsskúla í Suðuroy.

– Umsíðir eydnaðist tað at fáa undanfarnu samgongu at raðfesta miðnámsskúlan í Vági fremst og semja fekst harafturat at um at byggja hann í Vági.

Løgtingsmaðurin sigur, at tað hevur altíð verið hørð mótstøða ímóti at skúlin verður bygdur í Vági og hann er púra sannførdur um, at hetta nýggja tilboðið til Vágs býráð er onki annað enn tað seinasta átakið hjá ávísum politikarum at forkoma miðnámsskúlanum í Vági - eisini politikarum úr Suðuroy.

Hann er sannførdur um, at verður pilkað við ætlanina nú, verður skúlin forkomin.

*Hvat skal samgongan, sum eisini er mannað við fleiri suðuroyingum, fáa burturúr at forkoma skúlanum?*

–Teir hava rætt og slætt ongantíð viljað, at skúlin skuldi byggjast í Vági. Teir vilja ikki, at nakað skal vera í Vági og tí royna teir at forkoma teimum ætlanum, sum eru um framburð í Vági.

Og at flyta miðnámsskúlan í ein skúladepil í Hovi, saman við heilsuskúlanum, er fubb, tí løgmaður hevur sjálvur á tingsins røðarapalli tosa um vandan við at flyta heilsuskúlan av Tvøroyri, tí tað mátti ikki henda, at hann varð fluttur av Tvøroyri.

– Tí er tað bara uppá kvamsvís, at landstýrið nú tosar um at flyta skúlan til Hovs.

Hetta verður eisini undirbygt av, at ongin tíðarætlan fylgdi við tilboðnum hjá landsstýrinum til Vágs Býráð.

## Eru ikki so frægt sum spurd

Hergeir Nilsen sigur, at hóast allar kommunur í Suðuroy skulu vera saman um at byggja eitt røktarheim í Suðuroy, vendir landsstýrið sær bara til Vágs Kommunu og tað er heilt óskiljandi.

– Tað merkir, at hinar kommunurnar í oynni eru ikki so frægt sum spurdar.

Hann vísir á, at landsstýrið hevur harafturat onki sagt um, hvussu eitt møguligt røktarheim skal fíggjast.

– Er ætlanin at allar kommunurnar skulu betala sín part, er tað undrunnarvert, at ongar aðrar kommunur, enn Vágs Býráð, eru spurdar.

– Men er ætlanin hinvegin, at landið skal fíggja bygginguna, stendur tað tað altíð landstýrinum frítt fyri at byggja eitt røktarheim, hvar tað skal vera í Suðuroynni, tí eg ivist ikki í, allar kommunur í oynni høvdu fegnar útvegað grundstykki til endamálið.

– Vil landsstýrið byggja røktarheim í Suðuroy, vænti eg eisini heilt avgjørt, at peningur er settur av til endamálið á fíggjarlógini fyri næsta ár og sum verður løgd fyri tingið nú fyrsta dagin.

Hergeir Nielsen dugir annars væl at síggja fíggjarligu fyrimunirnir í at leggja fleiri skúlar saman.

– Eg havi sjálvur verið við til at gjørt uppskot fram um at byggja ein skúladepil í Hovi. Men tað datt niðurfyri og ístaðin varð gamla posthúsið í Vági bygt um til skúla.

– Síðani tann dag hevur ongin rødd í løgtinginum mælt ímóti, at tann nýggi skúlabygningurin skuldi byggjast í Vági. Og tí er tað heilt ófyrigeviligt, ivi nú verður sáddur um málið.

– Við hesum hevur landsstýrið sett suðuroyingar upp ímóti hvørjum øðrum í einum máli, har friður valdaði og sum ein loysn er funnin á.

Kortini ivast hann í, hvørjir fyrimunir eru í at leggja tveir so ymiskar skúlar sum ein miðnámsskúla og ein heilsuskúla saman

Annars var vanliga hugsanin, at tað var skilagott at byggja heilsuskúlan á Tvøroyri, har sjúkrahúsið er.

– Og mítt uppskot var at sjúkrasystraskúli harafturat skuldi byggjast upp at sjúkrahúsinum á Tvøroyri, saman við heilsuskúlanum, tí tað eru tveir skúlar, sum líkjast, sigur Hergeir Nielsen.

# Inntøkan lækkar tvær milliómir í Vági

**– Vágs Kommuna hevur repað seglini og næsta ár verður bara tað gjørt, sum ikki slepst undan at gera**

FÍGGJARÆTLAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



**Vágur:**
Í Vági er ógvuliga illa statt við arbeiði og tað fer at síggjast aftur í kommunala virkseminum.

Býráðið er í ferð við at viðgera fíggjarætlanina fyri komandi ár. Hon skal viðgerast einaferð afturat, men tað er í øllum førum greitt, at virksemi hjá kommununi fer at vera munandi skert komandi ár.

Ein meting vísir, at skattainntøkan hjá kommununi fer at fella heilar tvær milliónir komandi ár afturímóti í ár.

*Í Vági verður skattaprosentið ikki hækka næsta ár, hóast stóra, fíggjarliga trongstøðu hjá kommununi*

Í ár verður inntøkan hjá kommununi 34 milliónir, men næsta ár verður hon 32 milliónir, vísa metingarnar. Tað er sjálvandi vinnuloysið í Vági, sum ger seg galdandi.

Men Býráðið ætlar ikki at hækka skattin. Sostatt er semja um, at skattaprosentið skal framhaldandi vera 22,5% næsta ár og barnafrádrátturin skal eisini verða óbroyttur, tvs 2500 krónur um árið fyri hvørt barnið.

Men hetta ber so samstundis í sær, at kommunan má rættiliga repað seglini. Næsta ár verða sostatt ongar útbyggingingar yvirhøvur í Vàgi uttan tað, sum ikki slepst undan.

Tvs, at býráðið ætlar at seta eitt lítið sindur av til av til gøtuljós og kloakkir, skuldi onkur bygt í Vági. Annars er eisini ætlanin at seta 100.000 settar av til at gera kirkjugarðin lidnan fyri.

Annars verður bara roynt at hava kommununa gangandi við tí rakstri, sum er.



# Tingarbeiðið skal betrast

**Formanskapurin í løgtinginum hevur arbeitt við at leggja tingarbeiðið í fastari karmar. Hetta skal hava við sær, at bøtt verður um dygdina á tingarbeiðnum, og at tingmenn fáa betri viðurskifti at arbeiða undir**

TINGARBEIÐIÐ

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Endamálið er at fáa tingarbeiðið í fastari karmar. Hetta stigið er tikið fyri at bøta um dygdina á tingarbeiðnum, og betra um viðurskiftini hjá tingmonnunum. Meðan tað ofta hevur verið heldur tilvildarligt, nær tey ymisku uppskotini verða løgd fyri tingið, fer árskráin nágreiniliga at áseta tíðina, nær uppskotini verða løgd fyri tingið, sigur løgtingsformaðurin, Edmund Joensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Formanskapurin í løgtinginum hevur seinastu mánaðirnar arbeitt við at leggja tingarbeiðið í eina fastari legu, og hetta fer at hava umfatandi broytingar við sær.

Við hjálp av eini vegleiðandi ársskrá fyri tingarbeiði frá ólavsøku til einaferð í apríl mánaði, er ætlanin at koma trupulleikunum við mongu tingmálunum í november mánaði og mars mánaði til lívs.

– Nógv hevur verið tosað um, at tingmálini eiga at verða býtt javnari út enn higartil. Vit hava vanliga eina rúgvu av málum at taka støðu til í november og mars mánaði, meðan trýstið ikki eins stórt hinar mánaðirnar á árinum. Við at leggja eina ársskrá ber til at fáa tey umleið 150 málini, sum tingið viðgerð hvørja setu, býtt javnari út, sigur løgtingsformaðurin Edmund Joensen.

Í ársskránni hjá løgtinginum er ætlanin at hava greiðar ásetingar um, nær tær ymisku løgtingsnevndirnar eru uttanlands, og nær á árinum Norðurlandaráðs- og útnorðursfundir eru á skránni.

– Endamálið er at fáa tingarbeiðið í fastari karmar. Hetta stigið er tikið fyri at bøta um dygdina á tingarbeiðnum, og betra um viðurskiftini hjá tingmonnunum. Meðan tað ofta hevur verið heldur tilvildarligt, nær tey ymisku uppskotini verða løgd fyri tingið, fer árskráin nágreiniliga at áseta tíðina, nær uppskotini verða løgd fyri tingið, sigur løgtingsformaðurin.

Ætlanin er, at bæði landsstýrið og andstøðan skulu lata løglistarnar inn til løgtingið, og síðan verða tingmálini býtt út yvir alla tingsetuna.

Umframt eina vegleiðandi ársskrá, er ætlanin at seta eina nágreiniliga tingskrá fyri einum mánaði í senn. Henda skrá verður dagførd einaferð um vikuna, so møguleiki er fyri at lofta møguligum broytingum.

## Longri freist

Formansskapurin hevur eisini tikið stig til, at tingmenn skulu fáa longri skotbrá til at fyrireika seg til tey ymisku málini eftir, at tey eru løgd fyri tingið. Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, sigur, at framyvir er ætlanin, at tað skal ganga minst eina vika frá tí, at eitt mál verður lagt fyri tingið til, at farið verður undir fyrstu viðgerð.

Longda freistin er gjørd við tí fyri eyga, at tingmenn og onnur áhuga fáa møguleika at seta seg betur inn í málið, og harvið bøta um góðskuna á lóggávu arbeiðinum.

Ætlanin er eisini at leingja freistina millum framløguna av álitum og 2. viðgerð av løgtingsmáli, tá fleiri broytingaruppskot verða sett fram.

## Breið semja

Tað er breið semja millum politisku flokkarnar um ætlanirnar hjá formanskapinum við at áseta eina ársskrá og eina nágreiniligari tingskrá fyri hvønn mánað. Edmund Joensen greiðir frá, at formanskapur hevur bæði tosað við løgmann og floksformenninar, og allir partar eru sinnaðar at royna nýggju skipanina

– Hetta fer eisini at geva ymisku ráðunum betri møguleika at skipa og raðfesta sítt arbeiðið betur, heldur løgtingsformaðurin.

# Lakjuni fremur ikki lógarbrot

**Barbara á Tjaldrafløtti sigur, at ongar lógarásetingar krevja av landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni, at hann lýsir stjórastarvið í samanlagda ÚF og SvF leyst**

SAMANLEGGING ÚF/SVF

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tað er einki formelt krav, tá tveir almennir stovnar leggja saman, at ovasti myndugleiki lýsir starvið leyst.

Barbara á Tjaldrafløtti var forkvinna í bólkinum, sum orðaði almenna setanarpolitikkin. Hon er ikki av teirri sannføring, at landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, fremur lógarbrot, tá hann hevur gjørt av ikki at lýsa stjórastarvið í saman-lagda ÚF og SvF leyst.

Hon vísir á, at dømi eru um fleiri almennar stovnar, sum hava lagt saman uttan, at stjórastarvið hevur verið lýst leyst. Einfalda grundgevingin hevur verið, at ovasti myndugleiki á almenna stovnunum ikki hevur mett, at tað hevur verið neyðugt.

## Landsstýrismaðurin ger av

Í Sosialinum mikudagin helt formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, at landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, eigur at lýsa stjórastarvið í samanlagda ÚF og SvF leyst, tá fyribilsstjórin, Jógvan Jespersen, er liðugur við at fyrireika samanleggingina av loftmiðlunum, tí talan verður um ein grundleggjandi nýggjan stovn.

Jógvan á Lakjuni var ikki samdur við formanninum í Starvsmannafelagnum.

Hann metti ikki, at talan verður um ein nýggjan stovn, tá ÚF og SvF leggja saman, men heldur eina umskipan av tveimum stovnum, ið røkja somu uppgávur.

Við teirri grundgeving helt Jógvan á Lakjuni ikki, at tað varð neyðugt at lýsa stjórastarvið leyst.

Tað tykist tí verða ein træta millum landsstýrismannin og Starvsmannafelagið, hvørt samanleggingin hevur ein nýggjan stovn við sær ella ei.

Barbara á Tjaldrafløtti sigur, at spurningurin um nýggjan stovn má síggjast við atliti at um talan er um nýggjar uppgávur og nýtt og øðrvísi innihald, men at tað í prinsippinum er landsstýrismaðurin, ið ger av, um talan er um eina samanlegging ella ein nýggjan stovn, og tekur síðan avgerðina um starvið skal lýsast leyst ella ikki.

– Hatta er metingarspurningur, tí eingin lógaráseting er um samanleggingar. Eg skilji væl sjónarmiðið hjá Starvsmannafelagnum um, at øll eiga hava møguleikan fyri at søkja starvið, men framferðarhátturin hjá Jógvan á Lakjuni er á ongan hátt ólógligur, sigur hon

*Skuldu vit ikki havt lóggávu um starvsetanir í samband við samanleggingar?*

Eg haldi ikki at hetta skal lógarásetast, tí tað kann gera skipanina ov stirvna. Tó haldi eg tað er umráðandi, at øll størv verða sett við kvalifiseraðum fólki, sigur Barbara á Tjaldrafløtti

## Fordømi

Barbara á Tjaldrafløtti nevnir samanleggingina av Føroya Tollstovu og Líkningarráð Føroya í 1992 sum fordømi um samanleggingar. Samanleggingin millum hesar stovnar verður skírd at vera størsta samanlegging av almennum stovnum í Føroya søgu.

– Tá metti ovasti myndugleiki, at talan var um eina samanlegging av tveimum stovnum, og ikki ein nýggjan stovn. Hóast røddir vóru frammi um, at stjórastarvið á samanlagda stovninum átti at verið lýst leyst, metti landsstýrismaðurin ikki tað var neyðugt, sigur Barbara á Tjaldrafløtti.